# Nógv lív í føroyska fótbóltinum í Keypmannahavn

**ÍF Føroyar luttekur við trimum liðum, og tey vinna nógv tær flestu ferðirnar. Besta liðið nærkast seriu eitt, og næstbesta liðið er, sum teir siga, eisini hótt av uppflyting**

ÚTISETAFÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Føroyski fótbólturin í Keypmannahavn stórtrívst. ÍF Føroyar luttekur við trimum liðum í landskappingum, og sambært heimasíðuni hjá felagnum – fotboltur.dk – so hilnast tað úrslitaliga væl. Besta liðið er í seriu 2, og teir eru á odda. Næstbesta liðið er í seriu 3, og teir liggja eisini til uppflyting ella, sum heimasíðani tekur til, so er næstbesta liðið hótt av uppflyting! Og tað gongst eisini sera væl hjá 3. liði.

Mest sum allir, ið eru við til at manna besta liðið, hava fyri stuttum spælt í 1. deild í Føroyum, og teir flestu teirra høvdu ivaleyst verið evni til besta liðið í barndómsfeløgunum, um teir nú komu aftur til Føroya og vandu eins nógv, sum tað verður gjørt í føroysku 1. deildini.

Føroyingarnir í Keypmannahavn venja – í hvussu so er teir, sum spæla á besta liðnum – men teir venja ikki so nógv. Heimavøllurin er, sum hann hevur verið í mong ár, á Kløvermarkini, og teir venja týsdag og hósdag.

Tað eru fýra av 26 umførum eftir at spæla í seriu 2. Tvey lið flyta upp í næstu røðina. Eftir at teir í heyst hava spælt fimm dystir á rað, uttan at teir hava tapt, lá Føroyar undan síðsta vikuskiftinum heilt væl fyri at flyta upp. Teir eru framvegis væl fyri, men tað er komin meiri spenningur í, eftir at teir sunnudagin taptu 2–1 ímóti KFB.

Hetta liðið tykist vera marran hjá føroyingunum í ár. Í vár vunnu føroyingarnir sjey teir fyrstu dystirnar, men so taptu teir 4–3 ímóti KFB, eftir at Føroyar høvdu verið frammanfyri 3–0, og í regninum og vindinum sunnudagin var aftur galið. Sambært heimasíðuni hjá ÍF Føroyum kom einki mál í 1. hálvleiki, tá føroyingarnir høvdu nógv meiri spæl og fleiri møguleikar. Í 2. hálvleiki kom mótstøðuliðið framum 2–0, áðrenn Jørgin Meitilberg við stútara minkaði um munin.

Á heimasíðuni verður undirstrikað, at nú verður tað neyðugt at stríðast, um tað skal eydnast at gera dreymin um uppflyting til veruleika.

Sunnudagin var manningin á føroyska liðnum henda: Sunnvard Joensen, Herbert í Lon Jacobsen, Kári Sigvardsen, Niclas Niclasen, Ari Thomassen, Hegga Samuelsen, Eyðun Højgaard, Magni Mohr, Jan Guttesen, Finn Mørk, Høgni Hansen, Valbjørn Jacobsen, Jørgin Meitilberg og Eyðun Jensen.

Umframt á heimasíðuni hjá felagnum, sum ofta verður dagførd, ber til at fylgja við, hvussu tað gongst hjá besta føroyska liðnum á hagtalssíðunum í mánadagsútgávuni av Politiken.

Næstbesta liðið hevur í seriu 3 vunnið fýra teir síðstu dystirnar við málmuninum 24–2, og 3. liðið hevur í seriu 4 spælt seks dystir upp í slag uttan at tapa.

### Knípti at minnast navn og føðingardag

Ivaleyst allir føroyingar, sum hava roynt seg eitt sindur í fótbólti, og sum í útbúgvingarørindum hava búleikast í danska høvuðsstaðnum, munnu hava spælt meiri og minni við ÍF Føroyum. Og tað renna ivaleyst nógv hungalig og stuttlig minni fram fyri fyrrverandi útisetar og fótbóltsspælarar í Keypmannahavn, tá teir hoyra ella lesa um ÍF Føroyar.

Nógvu tey fyrru árini luttók ÍF Føroyar í Dansk Arbejder Idræt ella DAI kappingini, sum tað varð nevnt. Fyri ikki so nógvum árum síðani flutti føroyska fótbóltsfelagið úr DAI og í økissamband undir DBU.

Tað tykist sum um – í hvussu so er á besta liðnum – at tað verður gjørt meiri við skriviarbeiðið, enn tað plagdi at verða.

Tað var so mangan, at einir 6–8 føroyingar stóðu á onkrum vølli í Keypmannahavn, og tá ásetta dystartíðin var komin, heittu teir á dómaran um at fáa dystin útsettan teir tíggju minuttirnar, sum tað var loyvt at biðja um. So komu aðrir tuskandi, og sum 1. hálvleikur leið varð liðið fullmannað. Føroyingar hava altíð havt trupult við at rokna ferðingartíðina út, og tað varð mangan hildið, at tað fór at bera til at finna fram til ferðamálið, meðan man ferðaðist.

Skrásetingin av spælarunum var ikki altíð so neyv. Tí var tað vanligt, at spælararnir undan dystarbyrjan fingu at vita, hvørjum navni teir spældu undir, og so var neyðugt at skriva navn og føðingardag í lógvan. Tað var komiskt, um dómarin fann uppá at spyrja um navn og føðingardag. Spælarin noyddist at lúra í lógvan, áðrenn hann var førur fyri at svara fyri seg sjálvan!

### Skinnararnir

Tá tað fyri einari lítlari fjórðingsøld síðani varð kravt, at allir spælararnir skuldu hava beinskinnarar, var hetta ein stórur trupulleiki hjá útiseta føroyingunum, tí tað vóru ongantíð allir, sum høvdu beinverjur.

Tveir hættir vórðu vanliga nýttir at loysa tann trupulleikan uppá. Annar var, at tað altíð skuldi liggja í hvussu so er eitt par av skinnarum á síðulinjuni. Tá dómarin legði til merkis, at ein spælari ikki hevði skinnarar og bað hann fara eftir beinverjum, so var tað ikki nakar trupulleiki. Men so skuldi ein annar spælari – sjálvandi uttan at dómarin legði tað til merkis – leggja sínar skinnarar á staðið, har hin fyrri hevði tikið skinnararnar, og soleiðis mól myllan.

Hin mátin var, at nakrar síður úr Politiken ella einum av hinum morgunbløðunum, sum spælararnir plagdu at lesa í tokinum á veg til útidystirnar, vórðu kroystar niður í hosurnar. Ivaleyst mundu nógvir dómarar síggja, hvussu skilið var, men ofta lótu teir seg ikki at uppdaga, at talan ikki var um rættuligar skinnarar, men heldur um síður úr bløðunum!

Føroysku útiseta spælarunum í ÍF Føroyum verður ynskt alt tað besta og ein góðan endaspurt í landskappingini. Ivaleyst spæla teir nú undir røttum nøvnum og føðingardøgum og við orduligum beinskinnarum niðri í hosunum!

# Triathlon má bíða

**FM í 1/4 Triathlon fyri einstaklingar er av tekniskum ávum útsett ein mánað. FM-Sprint fyri lið verður sama dag**

TRIATHLON
*Tíðindaskriv*

FM í 1/4 Triathlon sum skuldi verða 29. september er av tekniskum ávum útsett ein mánað, og Føroya Triathlon Felag skipar tí sunnudagin 27. oktober kl. 13.00 fyri FM í 1/4 Triathlon.

Kappingin fer fram í Havn, og verður hesaferð á sokallaða OL-teinurin, sum er 1500 m svimjing, 40 km súkkling og 10 km renning.

Svomið verður í Svimjihøllini í Gundadali. Liðugur at svimja skal íðkarin skunda sær út á súkkluna, og verður súkklað til Kaldbaks, inn aftur í Kaldbaksbotn, út til Kaldbaks enn einaferð, og so aftur til Havnar, til rundkoyringina á Norðara Ringvegi, og so oman til Skógrøkt Landsins, har skift verður til renning.

Renningin verður tvær ferðir frá Skógrøkt Landsins, til Føroya Sparikassa Yviri við Strond og aftur til Skógrøkt Landsins, har málið er.

Fyri at økja um áhugan fyri hesi ítróttagrein, nú stundar til Oyggjaleikir, bjóðar FTF stovnum og feløgum at senda bestu ítróttafólk síni til kappingina.

Fyri ikki heilt at ræða fólk, er avgjørt at stovnar og fyritøkur kunnu vera við sum lið t.v.s. at ein svimjari, ein súkklari og ein rennari sláa seg saman og umboða fyritøkuna.

Best er sjálvandi um allir íðkararnir eru frá somu fyritøku, men hetta er eingin treyt.

Um ikki ber til at finna eina hóskandi súkklu, so ringið, og FTF finnur eina.

Kappast verður soleiðis í lið-sprint: 750 m svimjing, 20 km súkkling, 5 km renning

Fyrst verður svomið í Svimjihøllini í Gundadali, síðani út á súkkluna, og verður súkklað frá Svimjihøllini til rundkoyringina við Skansan og aftur til rundkoyringina R.C.Effersøesgøta/Norðari Ringvegur 3 ferðir, og so oman til Skógrøkt Landsins.

Her verður skift til renning, og runnið verður frá Skógrøkt Landsins niðan eftir Hvítanesvegnum til høgru eftir Skraddaragøtu, inn á gøtuna kring Skógrøktina og aftur til málið við Skógrøkt Landsins. Runnið verður 6 ferðir runt.

Nú kappingin verður so seint á árinum, er umráðandi at íðkararnir eru væl klæddir, tí er veðrið ikki til vildar, kann túrurin gerast møðsamur og ógvuliga kaldur, so best er at binda um heilan fingur.

# Nógvur turbolensur er í Vejle

**Áskoðararnir eru alt annað enn væl nøgdir við, at leiðslan í felagnum ætlar at leggja besta fótbóltsliðið saman við grannunum í Horsens**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*

Í gjárkvøldið fóru Christian Høgni Jacobsen og liðfelagarnir hjá honum á 1. deildarliðnum í Vejle á heimavøllin í Nørreskóginum. Setningurin, sum skuldi greiðast, var uppgáva í fjórða uimfari í DONG Cup, sum danska steypakappingin verður nevnd. Mótstøðuliðið var HFK Sønderjylland. Hvussu tað gekk hjá Christian Høgna og teimum í tí dystinum venda vit aftur til í morgin.

Men eitt er fótbóltsspælið í Vejle. Nakað annað er fótbóltspolitiska stríðið, sum hevur verið uppi í fleiri ár, og sum aftur nú stendur í ljósum loga.

Áður hevur verið tosað um – og nógv hava verið ímóti tí – at Vejle á elitustøði skuldi leggjast saman við Kolding og Fredericia, og at tríkantsøkið harvið skuldi hava betri fyritreytir at profilera seg á hægsta støði. Men tað gekk ikki. Kenslurnar hjá teimum, sum stuðla og hyggja at, vildu ikki sum tey, ið á rokniarkinum sóu reyðu tølini á botnlinjuni, og so datt royndin niðurfyri.

Nú er eldur komin í aftur, tí tað er vorðið alment, at nevndin í Vejle aftur arbeiðir við ætlanum um samanleggin. Hesa ferð hava teir vent sær burtur frá tríkantinum. Ístaðin ætla teir at legga saman við grannunum fyri norðan. Horsens hevur eisini lið í næstbestu deildini. Hvørki felagið verður mett sjálvt at vera ført fyri at fáa fíggjarligt grundarlag til vega fyri liðið í superliguni – tað verður roknað við, at 13-14 milliónir suklu fáast til vega – men tey, sum eru fyri ætlanunum, rokna við, at um 1. deildarliðini verða løgd saman, so fer tað at bera til.

Ætlanirnar eru sum at rætta hundi brand. Á heimasíðuni hjá Vejle viðhaldsfólkunum eru tey ikki blíð. Tað er væl skiljandi, tá ætlanirnar verða fataðar, sum um tað í Føroyum høvdu verið B36 og HB, sum skuldu leggja saman!

Býráðsformaðurin í Vejle, hann eitur Flemming Christensen og er úr SF, sigur í Vejle Amts Folkeblad, sum er eitt slag av Norðlýsi, at ætlanirnar lutka av panikki stutt undan afturlatingartíð. Vejle hevur í løtuni ongan høvuðsstuðul, ongan stjóra og ongan sponsorseljara, og nevndarformaðurin hevur boðað frá, at hann ætlar sær ikki at taka við afturvali.

Men í Vejle nevndini standa teir við sínar ætlanir. Teir duga ikki at ímynda sær aðra loysn fyri at koma aftur í superliguna, enn at leggja saman við grannunum. Spurningurin er so, um arbeiðsgevarinhjá Christian Høgna Jacobsen fer at vera til í bestu ella næsbestu donsku fótbóltsdeildini um eitt ár.


# Fólk til bókhaldið

**Søkt verður eftir lærlingi/skrivstovufólki til bókhaldið hjá Atlantic Airways á flogvøllinum.**

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur FHS, HH, líknandi prógv ella viðkomandi royndir.

Annars rokna vit við, at tú dugir at arbeiða við teldu, ert ágrýtin, hevur góðan røkjuskap og evni at samarbeiða.

Skrivlig umsókn og prógv verða at senda til Atlantic Airways, 380 Sørvágur, í seinasta lagi 10. oktober 2002.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast hjá Atlantic Airways á tlf 34 10 32 ella 34 10 33.

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo

# Super tilboð




**HP Omnibook XE4500**
- P4 1.7 Ghz
- 256MB RAM
- 30GB Harddisk
- DVD og Disklastøð
- 10/100Mbit netkort
- 14" TFT-skerm
- ATI Radeon M6 skermkort
- TV-útgang
- Windows XP Pro

**Ein ótrúlig telda til tær mest krevjandi uppgávurnar.**
**Koyrir ca. 3 tímar við battarí orku.**
**Atgongd til DVD og disklastøð samstundis.**

COMPAQ Local Service Partner
COM-DATA
www.com-data.fo
Klaksvík tlf. 476100 Saltangará tlf. 449840

# Avloysarar

Á Føroya landsbókasavni eru hesi avloysarastørv leys at seta:

**Bókavørður**
Fyri bókavørð í farloyvi verður søkt eftir fólki at byrja 1. november ella skjótast gjørligt. Til starvið krevst útbúgving sum bókavørður.
Fólk við royndum í bókasavnsarbeiði hava fyrimun.
Tann, ið settur verður, skal arbeiða við skrásetingaruppgávum og annars taka lut í øllum vanligum bókavarðaarbeiði.
Starvið verður lønt í bólki VI sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.
Setanartíðarskeiðið er eitt ár.

**Bókasavnshjálpari**
Fyri bókasavnshjálpara í farloyvi verður søkt eftir fólki at byrja í bókabindingini 18. november 2002 ella skjótast gjørligt. Arbeiðsuppgávan fevnir um innbinding, plasting og klárgerð annars av bókum til bókasøvnini.
Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.
Setanarskeiðið er 24 vikur.
Umsóknir við prógvskjølum verða at senda Føroya landsbókasavni í seinasta lagi 19. oktober.

23. september 2002
FLB
**Føroya Landsbókasavn**
J. C. Svabosgøta 16
Box 61 · 110 Tórshavn
Tlf. 31 16 26 · www.flb.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2586, Sp/f Henrik Solberg, 825 Froðba.

**Viðtøkur broyttar:** 01.03.2002.
**Nýtt navn:** Sp/f Solberg
**Nýggj adressa:** 826 Trongisvágur.

*Skráseting Føroya tann 24. september 2002*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 219, Sp/f 18. november 1973, 100 Tórshavn.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Frands Hyne Gregoriussen, í Víka, 100 Tórshavn (formaður)
**Innkomin í nevndina sum formaður:** Aksel Berg, Hetlandsvegur 16, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 24. september 2002*

*Kristin Balle*

# STÓRFINGIN MØTIR

er a tr ttar øllini unav k

Hóskvøldið 26. sept. kl. 20.00
Fríggjakvøldið 27. sept. kl. 20.00


Bróðir Yun, ella tann Himmalski maðurin sum hann eisini verður kallaður

Kom og lurta eftirhesum manni, sum stendur fyri eini evangeliskari hússamkomu í Kina, ið telur meir enn 70 milliónir.
Kom og hoyr hvussu hesin maður hevur verið píndur, forfylgdur og sitið í fongsli fyri sína trúgv. Hóast alt hetta hevur Guð virkað í honum bæði undur og tekin.
Kom og uppliva hvat Harrin ger runt allan heimin, har menniskju verða frelst, grødd og sett í frølsi.

*Jesus kann møta tær - Verð tú hjartaliga vælkomin á møti*

*Samkoman Keldan Skálafirði & Meinigheitin í Hoyvík*

Sosialurin -tað loysir seg

www.sosialurin.fo

www.sosialurin.fo